*Nú fimm boripallar við føroyska markið - tann sætti á veg:*

# Fyrsta oljan upp úr Hetlandsrennuni um eina viku




*Pílurin vísir, hvat í løtuni fimm oljuboripallar arbeiða. Tann sætti er á vegi.*

***Roydnirnar hjá stóru oljufeløgunum BP og SHELL at fara undir oljuframleiðslu í Hetlandsrennuni hava nú tikið veruligt dik á seg. Í løtuni bora heilir fimm oljupallar eftir olju einans 10 kilometrar frá føroyska markinum. Og tann sætti pallurin er á veg.***

***BP og Shell, sum tykjast at liggja á odda í kappingini í hesi nýggju og lovandi oljuprovinsini fara longu um eina góða viku at taka upp fyrstu oljuna. Eitt risastórt tangaskip verður nú gjørt klárt at seta kós móti Foinaven-oljukelduni, sum liggur 95 fjórðingar í ein landssynning úr Akrabyrgi.***

***Sosialurin hevur kannað málið. Vit hava tosað við tveir av talsmonnunum hjá BP í Aberdeen.***

BP-talsmaðurin harra Garden váttar tíðindini frá manningini á Smyrli, at teir nú hava ikki færri enn fýra boripallar í økinum. Tað eru tær báðar oljukeldurnar, Foinaven og Shihallion, sum teir nú vilja kanna nærri. Endamálið við boringunum er at fáa eina betri fatan av, hvussu goymslurnar síggja út og hvussu stórar tær eru. Her er tó fyrst og fremst talan um ta einu kelduna, Foinaven.

-Vit hava funnið olju og vilja nú vita, hvat tað er vit hava funnið. Hetta kunnu vit bert gera við at bora sigur BP-talsmaðurin.

Upp á fyrispurning, hvussu tað ber til, at teir longu nú hava ikki minni enn fýra boripallar á staðnum sigur Garden, at tað hevur gingið rættiliga væl við kanningunum. Tey góðu úrslitini hava skundað undir alla verkætlaninaat fara undir lønandi oljuframleiðslu úr nýggja økinum í blokki 204 vestan fyri Hetland. Hetta økið er á sjálvum kantinum á Hetlandsrennuni. Talan er um umleið 500 metra dýpi og borað verður heilt niður á 2900 kilometrar.

### BP og Shell komin longst

Fleiri altjóða oljufeløg hava fingið tillutað boriloyvi í tí stóra og lovandi økinum framvið miðlinjuni millum Føroyar og Hetland.

BP og Shell eru tey feløgini, sum eru komin longst umframt tað amerikanska felagið Amerada Hess. Men eisini onnur feløg liggja framvið, eitt nú Texaco, Neste, Amoco o.a.

Tað var Amerada Hess, sum var tað fyrsta felagið, ið rakti við olju í hesum nýggja økinum. í juni 1992. Seinni, tað var í oktober sama ár, raktu BP og Shell við olju í økinum, bert stutt frá staðnum, har amerikanarar høvdu funnið olju nakrar mánaðir frammanundan.

Tað eru tey, sum halda, at talan er um eina og somu oljukeldu, tvs. eina risastóra oljukeldu, sum fevnir um eitt stórt øki, sum oljufeløgini hava funnið.

Tað var fyrr í ár, at BP og Shell fluttu ein boripall úr Norðsjónum til Foinaven at fara undir víðari kanningar. Seinni eru komnir tríggir aftrat, soleiðis at har nú eru fýra pallar.

Garden sigur, at oljukeldurnar teir hava funnið eru stórar og áhugaverdar, hóast tær kanska ikki eru so stórar sum tær størstu teir hava funnið í Norðsjónum.

Hann vísir annars á, at teir hava borað vestan fyri Hetland síðani seinast í 70-unum.

Oljufeløg hava borað millum 80 og 100 hol í økinum vestan fyri Hetland seinastu 15 árini. Fyrsta stóra oljufundið var Clair-økið, sum liggur norðari og longur eysturi. Milliardir av pundum eru brúkt til at kanna og gera Clair-økið klárt til framleiðslu, men enn røkist einki fyri eini veruligari framleiðslu úr hesum økinum. Orsøkin er m.a. tann, at oljan er í tjúkkari lagi og at trýstið er ikki nóg gott.

Nú hava bretar og aðrir so lagt Clair á hillina eina tíð og eru farnir at brúka allar kreftir til at kanna Foinaven-kelduna.

### Tangaskip eftir fyrstu oljuni

Nú BP og Shell hava heilar fýra boripallar í blokki 204, har oljukeldan Foinaven liggur, verður gjørt klárt til at taka upp ta fyrstu oljuna.

Bill Moore, talsmaður hjá BP í Aberdeen sigur við Sosialin, at eitt stórt tangaskip nú riggar til at taka ímóti tí fyrstu oljuni. Skipið, ið nevnist Vigdis Knutsen, verður við oljukelduna Foinaven 1. august og skal síðani taka ímóti olju í nakrar vikur. Skipið lastar umleið 100.000 tons.

Her er talan um eina "well-test" tvs. kelduroyndir. Teir royna við hesum at finna út av, hvussu oljan er at fáa upp, hvat slag av olju talan er um osf.

Hesar royndirnar fara at vara í einar seks til átta vikur.

Upp á fyrispurning hvussu stóran týdning BP leggur í júst hesar royndirnar sigur Bill Moore, at teir vanliga meta slíkar royndir av stórum týdningi ella sum hann málber seg "developments of major importens".

Hann viðgongur, at teir royna at skunda undir kanningarnar, soleiðis at teir sum skjótast til ber kunnu fara undir veruliga framleiðslu úr hesi nýggju oljukelduni.

Nú oljugoymslurnar í Norðsjónum eru við at minka og teir ikki hava fingið tað burtur úr Clair-økinum, sum ætlað, so verður nú allur dentur lagdur á at útvikla Foinaven og økið har.

Bill Moore sigur, at teir meta hetta økið sum eina nýggja oljuprovins, og stórur dentur verður lagdur á at koma í gongd skjótast tilber.

Hannn leggur aftrat, at ein orsøkin til at tað gongur so skjótt í hesum nýggja økinum er tann, at nýggjasta tøknifrøðin ger teir førar fyri at arbeiða bæði skjótari og betri enn áður.

-Vit síggja eisini, at vit duga betri og betri at arbeiða í slíkum økjum leggur hann aftrat.

### Verulig framleiðsla longu um eitt ár

Bill Moore sigur víðari, at teir í september fara at gera av, hvat víðari skal henda. Gongur sum ætlað, so kunnu teir fara undir veruliga framleiðslu í endanum av 1995.

Sosialurin hevur annars fingið upplýst frá oljukeldum í London, at tvey onnur stór feløg í løtuni gera kanningar nærhendis føroyska markinum.

Stóra oljufelagið Texaco er júst liðugt við at bora í blokki 202.

Amerada Hess er í løtuni í ferð við at leiga ein boripall til at bora í blokki 204. tvs. sama øki, har BP og Shell nú arbeiða.

Fyribils metingar um støddina á teimum oljukeldunum, sum BP og Shell hava funnið, siga, at tær tilsamans goyma millum 500.000 milliónir og 1 mia. tunnur av olju.

Tað kann annars sigast, at stóru oljufeløgini vísa føroyska økinum stóran ans, nú alt bendir á, at nógv olja er í undirgrundini beint eystan fyri føroyska markið.

Fyrr í ár hava umboð fyri bæði Amerada Hess og Statoil verið í Føroyum.

### Oljudíki

Tað ljóðar, at umboð fyri BP eisini hava í hyggju at koma henda vegin.

Feløgini hava stóran áhuga fyri seismisku kanningunum, sum í løtuni fara fram við Føroyar.

Tað eru tó tey, sum halda, at tey stóru oljufeløgini longu hava rættiliga nágreiniligar upplýsingar um føroysku undirgrundina og møguleikarnar at finna olju her.

Keldur vit hava tosað við, men sum ikki ynskja at verða nevndar, siga, at tað er okkurt, sum bendir á, at oljukeldurnar, ið bretar og amerikanarar hava funnið stutt frá føroyska markinum, møguliga eru partur av einum risastórum oljudíki, einum sokallaðum elefanti. Fyri at kunna vátta ella avsanna hesar gitingar - metingar - so er bert eitt at gera, og tað er at bora. Og tað er so júst tað, sum hendir í økinum í løtuni.

jan

Til BLAÐSØLURNAR

**sosialurin aftur ÚTSELDUR?**

**Boðið so beinanvegin frá á tlf. 11820.**

Uttanfyri vanl. arbeiðstíð upplýsir telefonsvararin hvar ringjast skal fyri at fáa fleiri bløð.

Tíðindablaðið SOSIALURIN